


www.oljan.fo

**Jan Müller** 07 - 12 - 2011

# Atlantic Petroleum framleiðslu aftur á beint

Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum sigur í fráboðan, at felagið í november hevði eina samlaða framleiðslu uppá 57.000 tunnur av olju frá teimum trimum keldunum, Chestnut, Ettrick og Blackbird. Dagliga framleiðslan var 1900 tunnur. Fyri alt 2011 hevur felagið framleitt millum 2000 og 2300 tunnur um dagin. Felagið vísir á, at Blackbird keldan fór undir aftur framleiðslu í november, væl undan tíðarætlan og innan fyri rakstrarætlanina. Framleiðslan frá Chestnut hevur verið avmarkað, meðan umvæling/útbygging eru gjørd. Hetta arbeiðið varð liðugt í november. Framleiðslan frá Chestnut varð eisini ávirkað av steðgi orsakað av fimm ára eftirliti av framleiðslupallinum (FPSO) Sevan Hummingbird. Hesin steðgurin vardi í 12 dagar í november. Upprunaliga varð eftirlitið sett til at vera í 2012 men varð framskundað til í ár. Nú er tann framleiðlsan komin í røttu leguna og fer Chestnut tí at hava fulla framleiðslu uttan steðg í komandi ári.